# ÁLIT

## UM

## ÚTBÚGVINGARTILBOÐ TIL ARBEIÐSLEYSAN

## UNGDÓM

**Greitt úr hondum hevur Lesiætlanarnevndin**
**1994**

| | | síða |
|---|---|---|
| **Evnisyvirlit** | | 2-3 |
| **Formæli** | | 4 |
| **Inngangur** | | 5 |
| **1.** | **Hugskot og stovnseting** | 7-10 |
| 1.1 | Fyriskipanir | 10 |
| 1.2 | Ráðlegging | 11 |
| 1.2.1 | Fólkaskúlin og frítíðarundirvísingin | 11 |
| 1.3 | Samstarv | 12 |
| 1.4 | Royndir | 13 |
| **2.** | **Endamál og innihald** | 13 |
| 2.1 | Endamálið við verkætlanini | 13 |
| **3.** | **Útbúgvingartilboðini og fjølbroytni teirra** | 14 |
| 3.1 | Nøkur uppskot um skipan av undirvísingini | 15-17 |
| 3.2 | Lærugreinainnihaldið | 17 |
| 3.3 | Læraratímanýtsla | 18 |
| 3.4 | Meting/eftirmeting | 18 |
| 3.5 | Fyriskipan av undirvísingini | 18 |
| 3.6 | Starvspraktikk, setursskúli, vinna o.a. | 19 |
| **4.** | **Kostnaðarætlan** | 19-21 |
| **5.** | **Høli, útbúnaður o.a.** | 21 |
| **6.** | **Næmingar** | 21 |
| **7.** | **Undirvísarar** | 22 |
| **8.** | **Leiðsla** | 23 |
| 8.1 | Hvussu eigur verkætlanin at verða stýrd? | 23 |
| 8.2 | Verkætlanarbólkurin (projektbólkurin) og uppgáva hansara | 23 |
| 8.3 | Hvør tekur avgerðirnar? | 24 |
| **9.** | **Fígging** | 24 |
| 9.1 | Fíggingarmøguleikar | 24 |
| 9.2 | Stuðulsmøguleikar | 25 |

| | | |
|---|---|---|
| **10.** | **Vandamál** | 25 |
| 10.1 | Hvørji vandamál kunnu stinga seg upp? | 25 |
| 10.2 | Útbúgvingarstøðini | 25 |
| 10.3 | Móttøkan | 26 |
| 10.4 | Undirvísingin | 26 |
| 10.5 | Undirvísingarmiðlar | 26 |
| 10.6 | Upplýsing um tiltakið | 27 |
| **11.** | **Royndir** | 27 |
| **12.** | **Samfelagsumhvørvið** | 27 |
| 12.1 | Bygdin/býurin og verkætlanin | 27-29 |
| **13.** | **Góðkenningin** | 29 |
| 13.1 | Stovnseting | 29 |
| 13.2 | Umsókn | 30 |
| 13.3 | Kæra | 31 |
| 13.4 | Løn/setanarviðurskifti | 31 |
| 13.5 | Næmingar | 31 |
| 13.6 | Umsóknarblað | 31 |
| **14.** | **Framtíðarvónir** | 31 |
| **15.** | **Samandráttur** | 32 |

# Formæli

Tann serliga støðan, vit eru komin í við stórum arbeiðsloysi, hevur í stóran mun rakt ungdóm okkara.

Landsskúlafyrisitingin hevur tí eisini tikið upp spurningin um, hvussu undirvísingarverkið kundi veitt yrkisleysum ungdómi útbúgvingartilboð, og Lesiætlanarnevndin fór í samráð við landsskúlastjóran undir at skriva álit um spurningin.

Sum kunnugt, so eru tað tey, ið fara úr fólkaskúlanum og einki vita sær, ið verða við sviðið soð. Hetta er sera sjónskt, nú arbeiðsloysi er. Ungdómurin roynir at koma sær framat, har sum møguleikar kundu verið, men tað eru tey, ið standa eftir við ongum, og tað svíður at hjá tí, sum kemur í ta óhepnu støðu einki at vita sær at gera. Tað ræður nú um at fara til verka og skipa so fyri, at ungdóminum verða givnar umstøður at virka og liva. Tað ræður um at ásanna, at tað má verða farið til verka, áðrenn ov seint er.

Lesiætlanarnevndin hevur nú latið úr hondum "Álit um útbúgvingartilboð til arbeiðsleysan ungdóm", og Landsskúlaráðið hevur einmælt samtykt at góðkenna álitið.

"Allur bati bøtur", verður sagt.

Tað ræður um, at vit taka hendur saman, so at ungdómurin kann lívbjarga sær og verða mentur at fóta sær á hesum klettum, sum eisini eru hansara.

Tað er vón mín, at hetta álit kann fara at beina okkum á leið, so at farið kann verða undir skilagóðar verkætlanir, sum fara at geva yrkisleysum ungdómi eitt innihald í gerandisdegnum, og sum fara at leggja lunnar undir eitt mennandi virksemi ungdómi okkara at frama.

Landsskúlafyrisitingin á summarmála 1994

Hensar Ellingsgaard

## II Inngangur

Tann stóra búskaparkreppan hevur sum kunnugt mangar álvarsamar avleiðingar við sær. Ringt er, at skip, fyritøkur, sethús og aðrar fastar ognir fara undir hamaran; men verri er tann menniskjaligi sorgarleikur, sum altíð fylgir í kjalarvørrinum á slíkari kreppu.

Vit vita um fólk í túsundatali, ið eru vorðin arbeiðsleys, og um hundraðtals onnur, sum eru farin av landinum í eini roynd at lívbjarga sær har í útlondum.

Millum hesar arbeiðsleysu landsmenn er ein vaksandi fjøld av ungdómi, sum tey síðstu árini er komin úr fólkaskúlanum, og sum hvørki er sloppin til arbeiðis, í læru ella útbúgving, og tað er givið, at mong av hesum ungu eru at finna teirra millum, sum longu eru rýmd av landinum.

Tey eru farin - fyribils, halda tey flestu, annaðhvørt tey nú fóru í lestraørindum ella til tess at fáa sær eitthvørt at takast við. Soleiðis hugsa tey, tí tað var á hesum klettum, at vøgga teirra hevur staðið, og higar stundar tí hugur teirra at koma og liva og virka ein dag, - og gævi satt tey ikki verða svikin!

Øll munnu vit vera á einum máli um, at ungdómurin er mesti dýrgripur tjóðarinnar, og missa vit hann í øllum kegli um skræðu og skuld, so verður tjóðini neyvan bót á borði. Tí má tað vera okkum øllum ein neyðsyn at royna og geva teimum ungu virkismøguleikar og eitt lívsinnihald, so tey støðugt kunnu varðveita samleikakensluna til ta tjóð, ið tey hevur fostrað.

Í okkara grannalondum, sum eisini eru nívd av arbeiðsloysi og mongu avleiðingum tess, verður tí nógvur peningur nýttur til útbúgvingartilboð og arbeiðsskapandi tiltøk fyri yrkisleysan ungdóm. Tað er tí at fegnast um, at peningur nú eisini er játtaður til arbeiðsskapandi tiltøk á løgtingsins fíggjarlóg.

Í hesum útbúgvingartilboðum eru eisini ítøkiligar verkætlanir, sum m.a. yrkislærdir (og kanska arbeiðsleysir) undirvísarar skulu hava ta undirvísingarligu ábyrgdina av. Royndir úr útlondunum sýna, at útbúgvingartilboð av slíkum slag kunnu í mongum førum verða byrjanin til sjálvstøðugt virksemi. Hjá okkum kunnu tílík tilboð tí júst verða sjálvur sprotin til nýggjar vinnulívsgreinir, sum vit hava so stórliga brúk fyri.

Tað var eisini við hesum viðurskiftum í huga, at Lesiætlanarnevndin í samráð við landsskúlastjóran fór undir at skriva hetta álitið um útbúgvingartilboð til arbeiðsleysan - og tí eisini arbeiðstøkan ungdóm.

Við støði í teim heimildum, sum bæði eru í fólkaskúlalógini og frítíðarundirvísingarlógini, er í hesum áliti víst á, hvussu fram eigur at verða farið hjá teimum, sum bæði hava hug, áræði og hegni til at fara undir onkra verkætlan á hesum øki.

Álitið um útbúgvingartilboð til arbeiðsleysan ungdóm er skrivað í teirri hugsan, at allur bati bøtir, og í tí treysti, at viðkomandi myndugleikar taka væl undir við uppskotinum, og tær formligu fortreytirnar kunnu verða loknar, so at onkur verkætlan vónandi kann byrjaði longu komandi skúlaár.

Lesiætlanarnevndin vil nýta høvið til at takka Gunnvør Eriksen, skrivstovukvinnu, fyri skrivaraarbeiði sítt.

Lesiætlanarnevndin hevur havt 4 fundir.

*Á grækarismessu 1994*

*Arnold Abrahamsen Ása Ellefsen Olaus Jespersen*

*Arne Ludvig Pauli Nielsen Andras Samuelsen Alex Sólstein*

*Petur Jacob Sigvardsen (fm.)*

# 1. Hugskot og stovnseting

Eftir galdandi lóg er fólkaskúlin ein sjey ára grundskúli og ein trý ára framhaldsskúli. Hóast næmingarnir eiga at verða undirvístir í tí árganginum, ið samsvarar við skúlaaldur teirra, so kunnu teir tó í samráð við foreldrini verða undirvístir í sama árgangi í 2 ár, um hetta má haldast at vera best fyri teir ( sí § 16,1).

Sambært fólkaskúlalógini hava bý-/bygdaráð og skúlanevnd skyldu til at syrgja fyri undirvísing í grundskúlanum og at tryggja møguleikar fyri undirvísing í framhaldsskúlanum av øllum børnum og ungfólki undir 18 ár, sum búgva ella hava tilhald í øki skúlamyndugleikans, um foreldrini ynskja, at tey verða tikin inn í fólkaskúlan. Tá talan er um serundirvísing ella aðra sernámsfrøðiliga hjálp, so fevnir henda skylda um næmingar frá 0-18 ár - og møguliga meir.

Við lógarbroytingini í 1992 er loyvi nevnliga givið skúlamyndugleikunum á staðnum í serstøkum føri at strika 18 ára aldursmarkið. Í viðmerkingunum til hesa lógarbroyting verður m.a. tilskilað, at tann samfelagsliga menningin hevur økt um tørvin bæði á útbúgving og eftirútbúgving, við tað at fráfaringarroyndir fólkaskúlans í eini ella fleiri lærugreinum eru vorðnar upptøkukrøv í fleiri útbúgvingum. Tískil verður serstakliga hugsað um einstøk tilkomin fólk, sum á henda hátt kunnu fáa møguleika at lúka ávís upptøkukrøv í sambandi við útbúgving. Hetta uppískoytið gevur eisini t.d. ferðsluskaddum fólki møguleika at seta seg aftur á skúlabonk, um tað kundi verið ynskiligt.

Men samanumtikið kann verða sagt, at sambært galdandi fólkaskúlalóg hava skúlamyndugleikarnir á staðnum skyldu til at syrgja fyri, at øll tey børn, sum eru í undirvísingarskyldugum aldri, og sum eru innskrivað í fólkaskúlan har á staðnum, *skulu fáa undirvísing*. Hesir somu skúlamyndugleikar skulu harumframt tryggja, at teir næmingar í kommununi, sum eru undir 18 ár (og kanska eldri), fáa *undirvísingarmøguleika* í framhaldsskúlanum.

Hetta eru so karmar fólkaskúlans - aldursliga, kunnu vit kanska siga.

Tað er tí neyvan nakað í sjálvum lógarkarminum, ið forðar fyri, at næmingur kann vera í fólkaskúlanum til 18 ára aldur - og møguliga longur. Men soleiðis er tað kortini ikki í veruleikanum.

## Arbeiðsleysur ungdómur við skerdan lut

Eini 2% av næmingum fólkaskúlans munnu fara úr skúlanum eftir 7 ára skúlagongd. Hini umleið 98% eru eini 9-10 ár í fólkaskúlanum. Síðan fara árliga eini 60% av næmingunum til ymsar miðnámsútbúgvingar - *og restini, eini 40% ella umleið 300 næmingum, standa so av einihvørji orsøk ikki hesir somu samfelagsligu møguleikar í boði. Hesir næmingar eru við skerdan lut!*

Í teimum góðu árunum var hetta ikki tann stóri trupulleikin, tí tá hevði vinnulívið jú brúk fyri øllum fullførum hondum; men í hesum tíðum, nú tað stóra arbeiðsloysið ger um seg í ólukkumáta, er viðvent í holuni. Fleiri fólk, og einamest ungfólk, hava longu tikið avleiðingarnar av arbeiðsloysinum og eru farin í fremmand lond, og verður ikki tikið annað skinn um bak, verða tað ivaleyst enn fleiri, sum í komandi døgum fara teimum á baki.

Hugsa vit t.d. um støðu teirra umleið 250-300 næminga, sum í ár siga fólkaskúlanum farvæl, og sum ikki kunnu halda fram í útbúgving, læru, vinnu o.ø., ja, so er støða teirra í stuttum henda:

*1) meðan javnaldrar teirra hvønn morgun kunnu fara upp til sítt dagsverk, hava hesir 250-300 unglingar yvirhøvur einki at fara upp til,*
*2) meðan javnaldrar teirra harumframt fáa mánaðarligan útbúgvingarstuðul frá tí almenna, fáa hesir arbeiðsleysu unglingar ikki eitt klovið oyra hvørki sum útbúgvingarstuðul ella sum aðra almannaveiting,*
*3) hesir unglingar royna so í fyrstu atløgu kanska at kroysta pening burtur úr foreldrunum, har fleiri teirra vegna arbeiðsloysi og aðra armóð ikki kunnu fáa endarnar at røkka saman, og tí verður lítið har at heinta hjá mongum.*

Tað er lætt at skilja, at tílíkur ungdómur kann koma í andsøgn til sítt egna samfelag, so hann beinleiðis kann gerast samfelags fíggindaligur, og við hesum kveikta hugburði er hann jú longu á veg inn í ta óndu ringrásina, har dagur verður nátt og nátt dagur, og har allir vanligir samfelagsligir normar verða endavendir!

Nú er tað tíbetur ikki so, at hetta gerst veruleiki hjá øllum teimum ungu, ið gerast arbeiðsleys, tí um so var, hevði staðið enn verri til, enn tað ger.

## Útbúgvingartilboð til tey arbeiðsleysu

Men tað er ikki minst fyri at forða fyri tí vanda, sum her liggur og lúrir, at okkara grannalond heldur vilja binda um heilan fingur og royna at geva hesum arbeiðsleysu unglingum nøkur onnur útbúgvingartilboð í fjølbroyttum innihaldi, vavi og longd.

Øll vita vit, at hetta einsamalt kann ikki kvala erkafíggindan, ið er arbeiðsloysið; men vit vita eisini, at allur bati bøtir, og tí eigur alt at verða gjørt, sum gerast kann fyri at lívga og bjarga tjóðarinnar dýrabarastu ogn, tí uppvaksandi ættarliðinum!

Tað vaksandi arbeiðsloysið er sum kunnugt eitt av teimum stóru vandamálum, sum mong lond hava at dragast við nú á døgum; men ymist er, hvussu politikarar og stjórnir í ymsum londum raðfesta, viðgera og taka støðu til sjálvan arbeiðsloysisspurningin.

Í Noregi, Svøríki, Finnlandi og Danmark t.d. verður rættiliga nógvur peningur nýttur til "onnur (alternativ) útbúgvingartilboð", ið serstakliga eru ætlað arbeiðsleysum ungdómi. Men í samanburði við hesi 4 Norðurlond er at kalla eingin stuðul veittur til henda sama arbeiðsleysa partin av ungdómi í Føroyum og Íslandi.

Tílík útbúgvingartilboð líkjast rættiliga nógv í innihaldi í okkara grannalondum, men tað má tó haldast at vera rímiligt at spyrja, hvørji útbúgvingartilboð munnu standa líknandi ungdómi í boði í tí ríki, sum vit eru partur av.

## Útbúgvingartilboð til arbeiðsleys í DK

Vit kunnu í hesum viðfangi nevna, at á sumri 1990 var ein endurskoðað lóg sett í gildi í Danmørk um:

1. *Unglingaskúlar*
2. *Framleiðsluskúlar og*
3. *Dagháskúlar.*

(Í § 33 stendur sum vanligt tilskilað, at "Loven gælder ikke for Færøerne og Grønland").

Unglingaskúlarnir hava eitt fjølbroytt undirvísingartilboð til unglingar millum 14 og 18 ár. Í løtuni eru um leið 340 tílíkir skúlar í DK.

Sum sjálvt heitið framleiðsluskúli (produktionsskole) ber boð um, so er uppgávan hjá hesum skúlaformi at bjóða arbeiðsleysum ungdómi til 30 ára aldur samskipaðar útbúgvingar-/framleiðsluskráir. Virksemi skúlans skal bæði fevna um verkligt arbeiði, framleiðslu og ástøðiliga undirvísing við atliti at framleiðsluni. Virksemi skúlans hevur til endamáls at geva luttakarunum betri fortreytir at kunna byrja eina veruliga útbúgving ella at koma út í vinnulívið.

Í DK eru mong dømi um næmingar, sum í hesum skúlum fingu tey fyrstu hugskotini um eina ella aðra framleiðslu, sum teir síðan hava ment sum sjálvstøðug virki, ið hava eydnast væl. Her kann tí vera talan um arbeiðsskapandi tiltøk í ymsum vinnulívsgreinum, og tað er í grundini næstan bert hugflogið, ið setur markið. Tað munnu vera mong dømi um lættan ídnað, sum á henda hátt kanska byrjaði í einum kjallara ella bilskúri, og sum seinni menti seg til eina fitta ídnaðarfyritøku. Í løtuni eru einir 180 sonevndir framleiðsluskúlar í DK.

Síðan er at nevna dagháskúlarnar, ið geva fólki yvir 18 ár tilboð um fólkaupplýsing.

Dagháskúlin, ið hevur 15 ár á baki, er sum hugsjón og stovnur sprottin úr fyritakssemi íbúgva í tí heimliga umhvørvinum. Næmingar á dagháskúlum eru aloftast borgarar, sum lítlan og ongan part hava fingið av tí samfelagsliga útbúgvingarvirkseminum, og samfelagsliga bakstøði teirra er mangan arbeiðsloysi. Í aldursbýti eru 60% av luttakarunum eldri enn 30 ár, og 80% av teimum eru kvinnur.

Dagháskúlarnir hava til endamáls at styrkja persónsmensku næminganna og at bøta um møguleikar teirra á arbeiðsmarknaðinum og í útbúgvingarkervinum. Í hesum skúlaformi verður undirvíst í einstøkum lærugreinum, lærugreinabólkum ella evnisøkjum. *Í løtuni eru umleið 160 dagháskúlar í DK.*

Umframt hesi mongu undirvísingartilboð er ein fjøld av øðrum líknandi undirvísingartilboðum fyri ungfólk og eisini tilkomin sum t.d. háskúlar, undirvísing í einstøkum lærugreinum, sum miða ímóti próvtøku, eftirskúlar við fjølbroyttum tilboðum, herímillum 11. skúlaár.

Eisini eiga at verða nevnd tey 78 sonevndu *"Voksen Uddannelses Centre" (VUC)*, sum eru í øllum amtum, og sum verða rikin og fíggjað av amtskommununum. Inn á hesar útbúgvingardeplar kunnu øll, ið hava fylt 18 ár, koma og fáa ókeypis almenna útbúgving alt eftir tørvi og ynski hins einstaka.

### Javnrættindi

Okkurt annað kundi eisini verið nevnt; men hetta skuldi kortini verið nóg mikið til at sagt okkum, hvussu ólík korini kunnu vera hjá borgarum í sama ríki. Vit hava stutt sagt at kalla einki av tílíkum útbúgvingartilboðum at bjóða okkara ungu arbeiðsleysu íbúgvum. Tað skuldi verið lagamanni at borið so í bandi, at føroyskur ungdómur kundi verið javnsettur við líknandi ungdóm í hinum partinum á ríkinum, og at tílík útbúgvingartilboð vórðu lagað til okkara serstøku viðurskifti.

Men vit hava tó ikki heilt ligið á tí løtu síðuni, tá ið tað snýr seg um útbúgvingarmøguleikar til tey 60 % av ungdómi okkara, - og alt gott at siga um tað; men tað sama kann tíverri ikki sigast, tá ið tað snýr seg um onnur útbúgvingartilboð til hini 40%, - tey eru tíverri gloymd!

Landsskúlafyrisitingin hevur havt hetta mál til viðgerðar, og í tí viðfangi hevur so landsskúlastjórin biðið Lesiætlanarnevndina við stuðuli frá ráðgevum og øðrum serkønum skúlafólki skriva sum skjótast eitt álit um "onnur útbúgvingartilboð", ið serstakliga eru ætlað arbeiðsleysum ungfólki. Vit kunnu sostatt siga, at hugskotið um onnur útbúgvingar-/undirvísingartilboð er sprottið úr teirri sjálvsøgdu hugsan, at undirvísingarverkið her á landi má eisini eftir førimuni gera sítt til at bøta um kor teirra ungu arbeiðsleysu.

## 1.1 Fyriskipanir

Tá ið tað snýr seg um útbúgvingar-/undirvísingartilboð av hesum slag, so hava vit sum er onga beinleiðis lóggávu á hesum øki; men treyðugt so, okkurt kundi kanska komið undir frítíðarlógina. Her verður serliga hugsað um tann skúlaformin, sum í DK verður róptur dagháskúli, har luttakararnir eru 18 ár og eldri. Men vit eiga sjálvandi at vera varin og ikki bert flyta útlendskar skúlaformar higar til lands. Í hesum viðfangi kundi kanska verið vert at umhugsað, um t.d. ein samanseting av dagháskúla og framleiðsluskúla kundi verið ein myndil, ið hóskaði okkara serstøku viðurskiftum.

Men tá ið farast skal undir nýggj tiltøk av hesum slag, so er neyvan rætt fyrst at hugsa um lóggávu. Betri er fyrst at loyva royndarskipanum og kanna, hvør tørvurin er, gera dyggar royndir, vandnar eftirmetingar o.s.fr., og so við støði í øllum hesum royna at finna ta skilabestu loysnina og gera ein hóskandi lógarkarm samsvarandi tí. Ella við at nýta orðini hjá K. K. Steincke: "Den kloge jurist tænker således: Hvilken løsning vil efter omstændighederne være den fornuftigste - så finder vi jo nok bagefter en eller anden paragraf at putte den ind under".

## 1.2 Ráðlegging

### 1.2.1 Fólkaskúlalógin og frítíðarundirvísingarlógin

Nú ið búskaparkreppan og harvið tað vaksandi arbeiðsloysið longu hava eini 2-3 ár á baki, er tað lutfalsliga talið á arbeiðsleysum føroyingum vorðið metstórt. Hetta ger seg serstakliga galdandi fyri tey 40% av teimum 16-20 ára gomlu, sum hvørki kunnu koma í vinnu, læru ella nakra miðnámsútbúgving.

Her hjá okkum eins og aðrastaðni má tað tí vera ein neyðsyn, at ráðlagt verður soleiðis, at hesin arbeiðsleysi ungdómur kann fáa undirvísingar-/útbúgvingartilboð innan fyri karmarnar í verandi lóggávu.

Sum longu nevnt í hesum áliti, so hevur fólkaskúlalógin ið hvussu er møguleika at bjóða ungdómi til 18 ára aldur undirvísing. Ein annar møguleiki er so frítíðarundirsíngarlógin, ið hevur rættiliga rúmar ræsur, bæði tá ið tað snýr seg um aldur og fjølbroytni í undirvísingartilboðum.

Tá ið hugsað verður um arbeiðsloysisstøðuna, vil Lesiætlanarnevndin mæla til, at møguleikarnir í báðum hesum lógum eiga at verða nýttir.

Í sambandi við ráðleggingina av undirvísingar-/útbúgvingartilboðum verður hildið skilabest at býta luttakararnar aldursliga sundur í hesar 2 høvuðsbólkar:

1) *luttakarar í 16-18 ára aldri kunnu fáa útbúgvingartilboð sambært § 26 í fólkaskúlalógini, og*
2) *luttakarar, ið eru 18 ár og eldri, kunnu fáa útbúgvingartilboð sambært § 15, 2. stk. í frítíðarundirvísingarlógini.*

Tað kann námsfrøðiliga og í sambandi við ráðleggingina verða ein fyrimunur, um næmingarnir í høvuðsheitum verða bólkaðir aldursliga, og ein tílík bólking kann væntandi eisini økja bæði um gyrðið og fjølbroytnið í tilboðunum.

**Viðvíkjandi 1: Tilboð eftir fólkaskúlalógini**

Lesiætlanarnevndin er av teirri áskoðan, at skilabest man vera at bjóða útbúgvingar-/undirvísingartilboð til tey 16-18 ára gomlu gjøgnum eina royndarskipan sambært § 26 í fólkaskúlalógini.

Hildið verður, at henda loysnin hevur fleiri natúrligar fyrimunir: hesir næmingar eru í fólkaskúlaaldri; bæði lærarar, aðrir undirvísarar og undirvísingarhøli til tann ástøðiliga og verkliga partin eru (lutvís) tøk, og um borið verður skjótt at við at loysa teir formligu spurningarnar, skuldu fleiri av hesum verkætlanum kunnað byrjað longu komandi skúlaár.

**Viðvíkjandi 2: Tilboð eftir frítíðarundirvísingarlógini**
Landsskúlaráðið kann sambært § 15, 2. stk. seta landsumfatandi frítíðarundirvísing v.m. í verk, og tilboðini eftir hesi lóg kunnu vera sera fjølbroytt, ikki minst tá ið hugsað verður um sjálvan lógarkarmin og skipanina av tilboðum fyri tilkomnar luttakarar. Hetta eigur at verða havt í huga í sambandi við ráðleggingina.

Í frítíðarundirvísingini er í løtuni ein fjøld av undirvísarum, ið hava drúgvar royndir á økinum, og harumframt eru nógv yrkislærd arbeiðsleys fólk, ið kunnu verða undirvísarar og vegleiðarar (instruktørar). Tað skuldi tí ikki staðið á at fingið undirvísingarhøli bæði til ástøðiliga undirvísing og til verkætlanir (t.d. verkstaðir).

Gjøgnum frítíðarundirvísingina fáa undirvísararnir góðkent eitt ávíst tímatal til ta einstøku lærugreinina, og er undirvísingarskeið teirra lokið, tá ið teirra játtaða tímatal er lisið. Við hesi skipan ber tí sera væl til at gera liðiligar verkætlanir, sum bæði kunnu vera ymiskar í innihaldi, vavi og tíð.

Hildið verður neyðugt, at tað er ein ráðleggingarbólkur/verkætlanarbólkur, sum hevur ta yvirskipaðu ráðleggingina um hendi, meðan tað eru einstakir persónar, ið taka sær av teimum dagligu málunum. Í sambandi við tey yrkiskunnandi skeiðini er umráðandi, at umboð/undirvísarar frá viðkomandi yrkisgreinum eisini eru við í sjálvari ráðleggingini.

## 1.3 Samstarv

Hugsandi er, at tað vera fleiri samstarvspartar aftan fyri verkætlanirnar/skeiðini. Hesi samstarvsviðurskifti fata um luttakarar, starvsvenjing, arbeiðspláss o.a..

Tey ungu arbeiðsleysu eiga sjálv at kunna skriva seg inn til tað útbúgvingartilboð, ið hevur teirra áhuga; men annars er ikki óhugsandi, at t.d. arbeiðsávísingin, almannaverkið, yrkisfeløg o.o. eisini fara at gera vart við seg í sambandi við tilmelding.

Tá ið tað snýr seg um yrkiskunnandi skeið, er at vænta, at hóskandi samskifti verður við viðkomandi útbúgvingarstovn.

6) At skapa sosiala trygd og samanhald luttakaranna millum, so at teir m.a. kunnu koma burtur úr teirri sosialt avbyrgdu støðu, sum arbeiðsloysið ofta ber við sær.

7) At stuðla luttakararnar í persónligu menningini og herímillum at menna sjálvsálit og sjálvsvirðing teirra, og fáa teir at verða virknar í teirri støðu, teir eru staddir í.

8) At kunna teir um samfelagið og royna at fáa teir at verða virknar í samfelagslívinum við atliti at, at eins egna støða broytist.

Um hugsað verður um endamálini við verkætlanunum, so koma vit helst til ta niðurstøðu, at tey yrkiskunnandi skeiðini fara helst at leggja dent á tær 4 fyrstu endamálsorðingarnar, meðan dagháskúlaskeiðini óivað fara at leggja mesta dentin á 4 tær síðstu endamálsorðingarnar.

Tað ber tó kortini ikki til at gera tílíkar avmarkingar millum tey ymsu skeiðini, við tað at fleiri sosial og persónsmennandi sjónarmið eru felags fyri skeið við ymsum innihaldi og stavnhaldi.

Samanumtikið kann tí verða sagt, at tað, sum eyðkennir tey ymsu skeiðini, er, at endamálið kann vera fjølbroytt, sjálvt um tað einstaka skeiðið samstundis hevur eitt ávíst stavnhald.

### Viðmerkingar

Av tí at arbeiðsloysið og vánaligar fíggjarligar umstøður mangan bera bæði vónloysi og ráðaloysi við sær, so verður málið við útbúgvingartilboðunum serstakliga at snúgva seg um at menna næmingin í treysti til sín sjálvs og til teir møguleikar, sum eru í felagsskapinum. Hetta kann varðveita hugin til at vera virkin og hava álit á, at enn kunnu skapast virkismøguleikar í hesum samfelagi okkara.

## 3. Útbúgvingartilboðini og fjølbroytni teirra

Sum nomið er við aðrastaðni í hesum áliti, so er umráðandi, at útbúgvingartilboðini/verkætlanirnar mega laga seg eftir tørvi luttakaranna. Tá ið undirvísingarskipanin verður ráðløgd, eigur tí at verða havt í huga, at hesum arbeiðsleysa ungdómi verður at standa í boði nøkur viðkomandi tilboð, sum bæði eiga at verða lagað og skipað eftir áhuga, førleika og møguleika teirra arbeiðsleysu og tí tilfeingi, sum er til taks.

Nú vita vit, at førleiki og tískil áhugi teirra arbeiðsleysu man vera so ymiskur, sum hugsast kann. Ikki minst av hesi orsøk sýna royndir úr okkara grannalondum, at verkætlanirnar í t.d. framleiðsluskúlum kunnu vera so fjøltáttaðar, at tað at kalla bert er hugflogið og ítøkiligar forðingar, ið seta markið.

Tá ið tann verkliga undirvísingin er lokin, kunnu næmingarnir annaðhvørt velja aðra verkliga undirvísing ella fara í holt við eitt verkligt framleiðslutiltak sum t.d at tekna, gera klæði o.s.fr.

Hetta uppskotið kann fevna um tríggjar næmingabólkar:

1) Teir, ið arbeiða við verkligum framleiðslutiltøkum burturav.
2) Teir, ið fáa ástøðiliga undirvísing og arbeiða við verkligum framleiðslutiltøkum.
3) Teir, ið fáa ástøðiliga undirvísing og verkliga undirvísing í sambandi við tíðaravmarkaðar verkætlanir við fakligari leiðbeining.

Til ástøðiliga tilboðið krevst annaðhvørt læraraútbúgving ella verkætlanarvend útbúgving.

Skotið verður eisini upp, at starvspraktikkin, kanningarferðirnar, fráðgreiðingarnar o.s.fr. verða fyriskipað av sama fólki, og at viðkomandi er við til at fyriskipa verkliga virksemið.

Hetta merkir, at viðkomandi samskipar tað dagliga virksemið í royndarætlanini, og skal hann hava ábyrgdina av:

- starvspraktikkini
- kanningarferðum og setursskúla
- næmingafrágreiðingum
- fastari luttøku í verkætlanunum
- at taka tímar hjá lærarum, sum í styttri tíðarskeiði arbeiða við verkætlanum
- at ráðgeva næmingum
- at vera sambindingarliður millum verkætlanina og leiðsluna av verkætlanini
- at verkætlanaruppskot eru tøk
- at neyðugar samráðingar fara fram við næmingarnar um verkætlanirnar
- uppskotum um, hvør ið skal leiða verkætlanirnar.

Hann skal vera við í verkætlanarbólkinum.

**2. dømi:**
Útbúgvingartilboðið verður skipað í tveir partar:
*1) tað ástøðiliga tilboðið*
*2) tað verkliga tilboðið*

Útbúgvingartilboðið er sett í minsta lagi til 34 tímar um vikuna.
*1. Ástøðiliga tilboðið*
*Vikutímatalið:*
Vikutímatalið verður lagað eftir lærugreinavalinum og um næmingarnir ynskja at fara til fráfaringarroynd ella víðkaða fráfaringarroynd í ávísari lærugrein.

*Lærugreinirnar:*
Undirvísingin ávís tíðarskeið lagar seg eftir lærugreinaynski næminganna.
Lærugreinabýtið kann t.d. vera:
Føroyskt
Rokn./støddfrøði
Norðurlendsk mál
Samtíð
Sálarfr./siðsemi

*2. Verkliga tilboðið*
Vikutímatalið verður lagað eftir verkætlanarvali næminganna.
Innihaldsliga skal verkliga tilboðið fevna um nakrar høvuðsyvirskriftir, og undirvísingin (útbúgvingin) skal verða skipað sum verkætlanir (projektir) við ávísum tímatali til hvørja verkætlan sær.

*Nakrar høvuðsyvirskriftir:*
1. Fiskivinna/onnur vinna
2. Landbúnaður/umhvørvisrøkt
3. Heimaídnaður/ítriv
4. Fjølmiðlar/samskifti
5. Fyriskipan av frítíðarvirksemi/leiðsla

Verkætlanarbýtið:
Verkætlan 1 - Dugnaskapsroynd
Verkætlan 2 - Teldusamskifti
Verkætlan 3 - Grønmeti

Vikutalið fyri verkætlanina má ásetast í hvørjum einstøkum føri.

## 3.2 Lærugreinainnihaldið
*1. Tað ástøðiliga tilboðið:*

*Føroyskt*
Undirvísingin skal miða eftir at styrkja førleika næminganna við atliti at undirvísingarinnihaldinum í 3. undirvísingarparti.

*Rokning/støddfrøði*
Undirvísingin skal miða eftir at styrkja førleika næminganna við atliti at undirvísingarinnihaldinum í 3. undirvísingarparti.

*Norðurlendsk mál*
Í norðurlendskum málum verður hugsað um lesnað og viðgerð av skaldskapi á upprunamálinum (Leiðbeinandi lesiætlan má gerast).

*Samtíð*
Undirvísingarinnihaldið í samtíð skal hava støði í lesiætlanini fyri 10. skúlaár.

*Sálarfrøði/siðsemi*
Landsskúlafyrisitingin hevur uppskot tøk til undirvísingarætlanir. Krøvini til HF kunnu eisini tillagast hesum útbúgvingartilboði.
Myndugleikin á staðnum skal hvørt ár gera ítøkiliga lesiætlan, ið samsvarar við útbúgvingartilboðini.

Undirvísingarinnihaldið í teimum kravdu ástøðiligu lærugreinunum skal í mest møguligan mun lagast til verkligu valini hjá næmingunum.

*2. Tað verkliga tilboðið:*
Tað verkliga tilboðið skal verða lýst við úrvali úr høvuðsyvirskriftum, við leiðbeinandi lesiætlan fyri hvørja verkætlan og við áseting av tíðarkarmi.

Av tí at næmingar og lærarar í felag skulu evna undirvísingarinnihaldið (verkætlanirnar) til, so ber ikki til frammanundan at siga, hvørjar verkætlanir (projekt) tann einstaki flokkurin fer at takast við.

Tann ítøkiliga lesiætlanin fyri ta ávísu verkætlanina verður úrslitið av tí samskifti, sum er millum næmingar og lærarar, og hon vil bæði í innihaldi og skipan verða lagað til umstøðurnar á staðnum.

## 3.3 Lærarartímanýtsla
Um vit hugsa okkum, at næmingatalið til tað ástøðiliga tilboðið er 25 - 30 næmingar, og at bólkstøddirnar til tey verkliga tilboðini eru 8 - 10 næmingar, so kann arbeiðast við trimum verkætlanum á 18 tímar samstundis.

## 3.4 Meting/eftirmeting
Næmingar, ið hava lærugreinir, har høvi er at bøta um úrslitini av fráfaringar-royndini ella víðkaðu fráfaringarroyndini, skulu hava talmet eftir galdandi fyriskipan. Í restini av teimum ástøðiligu tilboðunum verður skrivligt met givið.

Í verkligu tilboðunum verður skrivlig eftirmeting gjørd fyri hvørja verkætlan sær. Tað eigur eisini at verða tilskilað, í hvørjum vavi næmingurin hevur verið í starvspraktikk ella í vinnu.

## 3.5 Fyriskipan av undirvísingini
Tey ástøðiligu tilboðini kunnu verða løgd fyrrapart 4 dagar um vikuna. Tey verkligu tilboðini verða løgd 1 dag um vikuna og annars seinnapartar.

Henda støðisskipan kann bert verða galdandi eitt ásett tíðarskeið.
Tey tíðarskeið, næmingar eru á setursskúla, í starvspraktikk, ella teir á annan hátt fáast við samanhangandi verkligt virksemi, verður eingin undirvísing í ástøðiligu tilboðunum. Tíðarskeiðið beint eftir hetta verður tí alt nýtt til undirvísing í ástøðiligu tilboðunum.

Hetta setur serstøk krøv til fyriskipan av tíma- og lærugreinabýti.

### 3.6 Starvspraktikk, setursskúli, vinna o.a.

Næmingarnir skulu vera í starvspraktikki, ið hvussu er 8 vikur tilsamans. Praktikktíðin kann annaðhvørt vera samanhangandi, ella hon verður býtt sundur í helvt.

Harumframt eiga næmingarnir eisini at fáa høvi til at fara á setursskúla í minsta lagi 2 ferðir, 3-5 dagar hvørja ferð.

Næmingur kann velja at vera í vinnu í minsta lagi tað ásetta tímatalið heldur enn at fylgja verkligu undirvísingini.

## 4. Kostnaðarætlan

Tað er sjálvandi ikki so lætt at gera eina neyva kostnaðarmeting í hesum føri, tí ætlanin er nýggj, og vit vita tí av góðum grundum ikki, hvussu víðfevnandi hon verður.

Her niðanfyri hava vit tó roynt at gjørt eina kostnaðarætlan, sum hevur sítt støði í ymiskum flokkatali.

| | | 1 flokkur (30 næm.) | 1 flokkur (30 næm.) | flokkar (120 næm.) | 4 flokkar (120 næm.) |
|---|---|---|---|---|---|
| nr. | | Útreiðslur | Inntøkur | Útreiðslur | Inntøkur |
| | Fígging: | | | | |
| 1 | LSF | | 530907 | | 2123627 |
| 2 | Kommunugjald | | 106000 | | 424000 |
| 3 | Næmingagjald | | 15000 | | 60000 |
| 4 | Útbúgvingarstuðul | | 660000 | | 2640000 |
| 5 | Lønir | 488907 | | 1955627 | |
| 6 | Fyrisiting | 18000 | | 72000 | |
| 7 | Útferðir | 15000 | | 60000 | |
| 8 | Hølisleiga (mett) | 25000 | | 100000 | |
| 9 | Vask, hiti og ljós (mett) | 21000 | | 84000 | |
| 10 | Tilfar | 30000 | | 120000 | |
| 11 | Annað | 30000 | | 120000 | |
| 12 | Útbúgvingarstuðul | 660000 | | 2640000 | |
| 13 | Umsjón o.a. | 24000 | | 96000 | |
| 14 | Tilsamans | 1311907 | 1311907 | 5247627 | 5247627 |

## Viðmerkingar til kostnaðarætlanina

**ad: 1.**
Landsskúlafyrisitingin eigur at fáa játtað eina ávísa upphædd á løgtingsins fíggjarlóg til læraralønir. Upphæddin er roknað við 52 vikutímum til lærara og 8 vikutímum til ein leiðbeinara (instruktør) fyri hvønn flokkin. Tíðarskeiðið, ið útrokningin fevnir um, er eitt skúlaár t.v.s. 200 dagar.

Lønin er roknað við støði í eini miðal mánaðarlæraraløn og 100 kr. um tíman til leiðbeinaran.

**ad: 2.** Kommunan eigur at bera ein part av útreiðslunum. Her verður hugsað um høli, tilfar, ljós, vask, hita o.a.

**ad: 3.** Næmingarnir eiga at gjalda ein part av útreiðslunum; her verður hugsað um útferðir og sovorðið.

**ad: 4.** Næmingarnir eiga at fáa útbúgvingarstuðul á sama støði sum aðrir næmingar á teirra aldri.

**ad: 5.** Lønirnar eru, sum áður nevnt, roknaðar sum ein læraraløn í miðal. Møguliga kann hetta gerast bíligari, tí møguleikar eru fyri at brúka leiðbeinarar (instruktørar) til ein stóran part av virkseminum. Her verður serliga hugsað um tær verkligu lærugreinirnar. Mett verður, at ein flokkur hevur brúk fyri umleið 60 vikutímum. Hetta tal er kanska nakað høgt sett; men roknað verður við, at henda undirvísing krevur fleiri tímar enn vanlig fólkaskúlaundirvísing, tí arbeitt verður fyri ein stóran part í smærri bólkum.

Upphæddin er roknað út fyri 1 skúlaár.

**ad: 6.** Sjálvt um ætlanin er, at fyrisitingin skal vera undir fólkaskúlans leiðslu, so slepst ikki undan øðrum útreiðslum, sum ikki beinleiðis hava nakað við fólkaskúlan at gera. Neyðugt verður tí at hava nakað av eykafígging til fyrisiting.

**ad: 7.** Henda upphædd er ætlað til ferðapening í sambandi við starvspraktikk o. a.

**ad: 8 og 9.** Her er talan um mettar upphæddir. Tað er torført at gera eina neyva meting av kostnaðarstøðinum, tá ið tað snýr seg um hølisleigu, vask, hita og ljós. Tað veldst um, hvar ein er staddur í landinum. Í summum førum kunnu høli fáast bíliga til leigu. Tað fer ikki at bera til í øllum førum at nýta høli í fólkaskúlanum, tí tey eru ikki altíð nýtilig ella hóskandi til endamálið. Hetta kemst av, at tann undirvísing, ið her er talan um, er so sermerkt, at hølisligar umstøður vera ikki altíð í fólkaskúlanum fyri øllum virkseminum.

**ad: 10.** Ein partur av undirvísingini er framleiðsla. Hetta krevur nakað væl av tilfari. Nakað kann fáast inn við sølu. Her verður roknað við, at umleið 6% av samlaðu útreiðslunum kunnu fáast inn aftur við sølu av framleiðsluni.

**ad: 11.** Tað er ógjørligt at gera eina kostnaðarætlan, sum er so neyv, at ikki eitt og annað er, sum kemur aftur umaftur. Tað verður tí hildið neyðugt at hava hesa játtan.

**ad: 12.** Neyðugt er, at hesir næmingar fáa útbúgvingarstuðul á jøvnum føti við aðrar næmingar á teirra aldri, sum eru í aðrari útbúgving og fáa útbúgvingarstuðul. Stuðulstíðin er sett til 10 mánaðir.

**ad:13.** Upphæddin er roknað til eykaarbeiði hjá umsjónarmanni skúlans.

**ad:14.** Í tveimum teimum fyrstu teigunum er sett tann upphædd, sum roknað verður við, at ein flokkur við umleið 30 næmingum kostar. Roknast má við, at í mesta lagi 3 flokkar av hesum slag verða tað fyrsta árið - møguliga 4. Tveir teir seinastu teigarnir vísa eina meting um, hvat tað kostar at hava 90 næmingar og 3 flokkar.

**Niðurstøða:**
Á fíggjarlóg løgtingsins eigur ein upphædd at verða játtað sum stuðul til oman fyri nevnda endamál. Stuðulin eigur at verða givin í mun til, hvussu nógv heilárspláss skúlin hevur. Landsskúlafyrisitingin ásetur í samsvar við játtanina landskassastuðulin til hvørt heilárspláss, sum so lutfalsliga kann verða býttur sundur í smærri árseindir.

## 5. Høli, útbúnaður o.a.

Av tí at barnatalið í landinum er minkað munandi, skuldu undirvísingarhøli verið tøk í fleiri av teimum skúlum, ið hava framhaldsdeild.

Nú ið serstøk útbúgvingartilboð verða skipað eftir fólkaskúlalógini og frítíðarundirvísingarlógini, mugu skúlamyndugleikarnir á staðnum, har ynski eru um hesa skipan, lata høli, útbúnað, amboð, bøkur og annað til nýtslu hjá næmingunum. At tílík útbúgvingartilboð verða fyrst og fremst skipað á einari farmhaldsdeild er sjálvsagt, tí framhaldsdeildirnar eru sum kunnugt útgjørdar til líknandi endamál.

Slík útbúgvingartilboð kunnu neyvan verða skipað kring landið uttan í samstarvi við aðrar kommunur. Landsskúlaráðið má gera reglur um útreiðslubýti í sambandi við kommunusamstarv á hesum øki.

## 6. Næmingar

Henda skipanin vendir sær fyrst og fremst til ungdóm, sum er óvirkin vegna arbeiðsloysi, óarbeiðsføri o.s.fr., og hon eigur, alt tað er gjørligt, at vera so rúmlig, at øll tey ungu, sum kenna seg vera uttan fyri vanligu skúlatilboðini, her

kunnu fáa líkindi at gera tillagaðar skúla- og menningarroyndir, ið geva teimum álit á egnan førleika, á framtíðina og á teir møguleikar, sum eru í felagsskapinum.

Um pláss er fyri fleiri luttakarum, eiga tilboðini eisini at standa einum og hvørjum í boði, sum hevur hug og umstøður at vera við.

Tað er eingin ivi um, at fólk við ymsum arbeiðs- og lívsroyndum, sum samstarva í sama bólki, geva bólkinum lit, sum kann verða avgerandi fyri, um bólkarbeiðið eydnast ella ikki. Hann verður líkari teirri sosialiseringsskipan, sum vit, ið eru tilkomin nú, kenna frá arbeiðslívinum og frá samskiftinum millum manna í okkara barna- og unglingaárum.

Tilskilað eigur at verða, tá ið lýst verður, hvønn tilboðið í høvuðsheitum vendir sær til.

## 7. Undirvísarar

Við tað at lógarkarmarnir um hesi ætlaðu útbúgvingartilboð bæði eru fólkaskúlalógin og frítíðarundirvísingarlógin, so er at vænta, at undirvísararnir verða lærarar við fólkaskúlalærarútbúgving, kvøldskúlalærarar og aðrir yrkislærdir undirvísarar/vegleiðarar (instruktørar).

Tann skipan og tað samstarv, sum er millum Landsskúlafyrisitingina og Føroya Lærarafelag um fólkaskúlan, eigur eisini at vera galdandi fyri limir felagsins, tá talan er um hesa royndarætlan. Tað verður somuleiðis hildið skilabest, at verandi skipanir, sum eru galdandi fyri aðrar undirvísarar undir frítíðarundirvísingarlógini, eisini vera galdandi, tá talan er um hesa royndarætlan.

Um so er, at undirvísingarhølini skuldu verið uttan fyri tann skúla, sum lærarin starvast í, so eigur tað ikki at forða honum at verða við. Heldur ikki eigur lærarin at missa starvsaldur ella sítt vanliga tilknýti til skúlan av hesum virksemi.

Viðvíkjandi undirvísarunum sýna annars royndir úr okkara grannalondum,

- *at best er at hava so fáar lærarar sum gjørligt við so nógvum tímum sum gjørligt*
- *at besti førleiki teirra er at fata støðu lutakaranna, sosialu og menniskjaligu trupulleikar teirra, og*
- *at teir skulu vera í búnum aldri og hava fjølbroytt útbúgvingar- og yrkisligt bakstøði.*

# 8. Leiðsla

## 8.1 Hvussu eigur verkætlanin at verða stýrd?

Heimildin til skipanina eru § 26 í fólkaskúlalógini, sum gevur loyvi til at fremja verkætlanina sum eina royndarskipan í fólkaskúlanum, og § 15, 2. stk. í frítíðarundirvísingarlógini, sum gevur Landsskúlaráðnum heimild til at seta landsumfatandi frítíðarundirvísing v.m. í verk.

Skúlastjórin, ið eisini er tann formligi leiðarin av frítíðarundirvísingini v.m. á staðnum, hevur bæði ta fyrisitingarligu og námsfrøðiligu leiðsluna og ábyrgdina av virkseminum í skúlanum, og tí verður tað hann, sum kemur at hava ábyrgdina av verkætlanini.

Hesi útbúgvingartilboð hava sum grundsjónarmið, at næmingarnir kunnu fáa bæði ástøðiliga undirvísing og verkliga frálæru; men tað er tó einki til hindurs fyri, at luttakarar bert kunnu velja tann ástøðiliga ella tann verkliga partin, um tað var ynskiligt.

Tann ástøðiligi parturin verður í skúlanum, meðan tann verkliga frálæran kann vera uttan fyri skúlans gátt. Sagt við øðrum orðum: tað skal vera samsvar millum "teori og praksis". Næmingarnir skulu kenna, at teir eru partur av virknu arbeiðsmegini, sum aloftast hevur tørv á bæði ástøðiligari vitan og verkligum dugnaskapi og innliti. Verkætlanin hevur tí eisini til endamáls at knýta skúla og vinnulív fastari saman.

Av m.a. hesi somu orsøk er umráðandi, at gott samstarv er millum skúlans leiðslu, undirvísarar/vegleiðarar, vinnullívið á staðnum og teir kommunalu myndugleikarnir, og at allir partar eru við til at leggja tað nágreiniliga undirvísingartilboðið í økinum til rættis.

Kommunalu myndugleikarnir skulu gjalda undirvísingartilfarið, og vinnulívið á staðnum skal bera so í bandi, at næmingarnir kunnu fáa atgongd til arbeiðsplássini til verkligu frálæruna, bæði tá ið verkætlanin skal fremjast, og tá ið næmingarnir skulu út í starvslæru. Tí verður hildið neyðugt, at skipaður eigur at verða verkætlanarbólkur (projektbólkar) í hvørjum einstøkum útbúgvingarøki.

## 8.2 Verkætlanarbólkurin (projektbólkurin) og uppgáva hansara

Samsvarandi tí, ið frammanfyri er nevnt, verður skotið upp, at verkætlanin verður stýrd av einum verkætlanarbólki við trimum umboðum: einum umboði fyri kommunalu myndugleikarnar, einum fyri vinnulívið í økinum og so skúlastjóranum, sum eisini skal vera formaður og skrivari í bólkinum.

Verkætlanarbólkurin tekur tær prinsipiellu avgerðirnar verkætlanini viðvíkjandi, og tað er skúlastjórans uppgáva at fremja hesar avgerðir gjøgnum teir lærara/undirvísarar/vegleiðarar, sum eru við í verkætlanini.

**Verkætlanarbólkurin hevur til uppgávu**

-at ráðleggja hvørji útbúgvingartilboð skúlin kann bjóða
-at skipa fyri tí praktiska í sambandi við verkligu undirvísingina
-at finna nýggj starvslærupláss í økinum
-at koma við hugskotum um verkligu frálæruna

Formaðurin í verkætlanarbólkinum, t.e. skúlaleiðarin, hevur ábyrgdina av, at bólkurin ger tað, honum er álagt.

## 8.3 Hvør tekur avgerðirnar?

Eftir hesi skipan kemur verkætlanarbólkurin at taka avgerðirnar í teimum málum, sum eru løgd undir hann, og tað er hann, ið hevur høvuðsábyrgdina av royndarætlanini saman við skúlastjóranum.

Viðvíkjandi tí undirvísingarliga verður tað skúlanevndin fyri tann skúlan, har royndin verður framd, sum tekur tær avgerðir, ið annars vanliga eru lagdar til skúlanevndir, og bý-/bygdarráðið, sum tekur avgerðir av fíggjarligum slagi sambært galdandi lógum og reglum fyri fólkaskúlan.

# 9. Fígging

## 9.1 Fíggingarmøguleikar

Ávíst er aðrastaðni í álitinum, at heimild er bæði í fólkaskúlalógini og í frítíðarundirvísingarlógini at seta á stovn útbúgvingartilboð til arbeiðsleysan ungdóm sum eina royndarætlan. Men tann fíggjarligi spurningurin er tann stóri trupulleikin, tí á verandi játtan á fíggjarlógini hevur Landsskúlafyrisitingin ongan pening fingið játtaðan til tílík útbúgvingartilboð. Tí er avgjørt neyðugt at fáa pening játtaðan til hesa ætlan, um hon kann gerast veruleiki.

Tað er illa hugsandi, at tær kreppuraktu kommunurnar eru førar fyri at fíggja nakað - tær kunnu møguliga lata høli, ljós, hita og reingerð, men neyvan nakað stórvegis aftur at tí, sum støðan er í løtuni.

Men sum kunnugt er peningur settur av á fíggjarlógini til arbeiðsskapandi tiltøk, og tí er at vænta, at ein tørvandi partur av hesi peningaupphædd verður raðfestur til væl fyriskipaðar verkætlanir fyri arbeiðsleysan ungdóm.

Harafturat er kanska eisini ein møguleiki, at t.d. almannaveitingin, frítíðarundirvísingin v.m. kundu givið eitt ískoyti, so nóg mikið av peningi verður tøkur til hesa týdningarmiklu verkætlan Eitt munnu vit ið hvussu so er vera samd um, og tað er, at hon ikki má fara fyri bakka av fíggjarligum forðingum.

Tað er kanska eitt sindur óheppið at savna og fyrisita veitingar úr ymsum stovnum, og tí var sjálvandi best, um øll fíggingin til hesa royndarætlan fekst úr somu

fíggjarkeldu. Best var tí, um neyðugur peningur úr grunninum til arbeiðsskapandi tiltøk verður latin Landsskúlafyrisitingini at umsita, og hann haðani verður veittur teimum skúlum, stovnum o.ø., ið fara undir tílíkar góðkendar royndarskipanir.

### 9.2 Stuðulsmøguleikar

Annað vandamál í sambandi við tað fíggjarliga er, at næmingar í javnsettari miðnámsundirvísing fáa í flestu førum SU, meðan ætlaða undirvísingin ikki hevur henda møguleika at bjóða sum er.

Hetta kann koma at verða ein forðing fyri tilgongdina av næmingum, og tað kann eisini koma at skapa eina kenslu av undirmeting av hesum næmingum í samanburði við teir, sum ganga aðrastaðni í útbúgvingarkervinum. Tað verður tí neyðugt at skapa eitt mótvirði, so hesum næmingum verða veittar líknandi fíggjarligar sømdir.

## 10. Vandamál

### 10.1 Hvørji vandamál kunnu stinga seg upp?

Tað er sjálvandi ikki so lætt at meta um tey vandamál, ið møguliga kunnu stinga seg upp í sambandi við eina útbúgving, ið enn ikki er byrjað; men tó vita vit av líknandi royndum, at tað eru nakrar fortreytir, ið altíð mega verða loknar, áður enn farast kann til verka, og tær vilja vit tí siga eitt sindur um her.

### 10.2 Útbúgvingarstøðini

Ein spurningur, ið stingur seg upp, er, hvar í landinum hesi útbúgvingarstøð kunnu verða. Tað er helst skilabest at fyrireika seg væl, gera fullfíggjaðar verkætlanir, hava holla og støðuga ráðgeving og byrja í smáum við nøkrum fáum tilboðum, sum so vónandi fara at eydnast væl. Vit hava lítlar og ongar royndir á hesum øki, og tí er best at fara varliga fram. Fara vit tí undir nógvar og stórar royndarætlanir, er vandi fyri, at tær kunnu miseydnast, og kann tað hava óhepnar avleiðingar fyri hesar týdningarmiklu royndir.

Tað verður tí helst neyðugt í fyrstuni at savna tilboðini um nøkur fá útbúgvingarstøð, og sum frá líður, og vit hava roynt og eftirmett hesa royndarskipan, er møguleiki fyri at vaksa um útbúgvingartilboðini bæði í vavi og fjølbroytni.

Um útbúgvingarstaðið er í fjølbygdum øki við stuttari fjarstøðu, so eru færri trupulleikar. Verri er við fjarbygdum økjum, har neyðugt verður at miðsavna, tí til tess krevst flutningur, og hann kostar pening. Hetta eigur at verða havt í huga, tí tað er ikki sagt, at tað altíð ber til at samskipa samferðslumiðlar, -tíðir og útbúgving so væl, at tey altíð samsvara hvørt við annað.

## 10.3 Móttøkan

Tað verður ivaleyst so, at tílík útbúgvingartiltøk, sum bæði eru nýggj og ókend, munnu fáa ymsa móttøku millum manna. Tað verða óivað tey, ið fara at verða ivasom og spyrja, um yvirhøvur nakað sum helst gagn kann vera í slíkum framtaki, og tí fara neyvan øll at taka so glaðbeint undir við hesum ætlaðu royndum. Hetta verður galdandi fyri politikarar, kommunur, foreldur og næmingar.

Vit hava onga siðvenju at byggja á í so máta, og sagt verður, at menniskjan er konservativ av lyndi og dámar lítið broytingar, og tí er at vænta ein neiligan hugburð frá summum og ivasemi frá øðrum. Ikki minst av hesi orsøk er umráðandi, at allar verkætlanir og øll uppskot eru væl og virðiliga úr hondum greidd, áðrenn farið verður undir tiltakið. Í hesum sambandi eigur t.d. eisini at verða hugsað um: ábyrgd, leiðslu, lærarakreftur, samvinnu við arbeiðs- og vinnulívið, stovnar, aðrar skúlaformar o.s.fr.

Um hugsað verður um komandi skúlaár, so er skotbráið nú so stutt, at tað helst er í seinna lagi at fara undir tær stóru verkætlanirnar (- onkur minni kundi kanska verið roynd), tí skúlarnir eru nú samstundis í holt við at fáa eina broytta skúlaskipan at virka, eins og komandi skúlaár skal fyrireikast. Tí mega vit ansa væl eftir, at vit ikki í bráðræsni seta nakað í verk, sum ikki er gjølla fyrireikað frammanundan. Tað er nevnliga stórur vandi fyri, at ófyrireikaðar verkætlanir kunnu verða okkum ein "grúgvustabbi", og tá var tað betur ógjørt!

## 10.4 Undirvísingin

Av tí at næmingarnir ikki eru so vanir við at stýra bólkarbeiði/verkætlanum, so er ikki óhugsandi, at umrødda undirvísing/verkætlan verður nógv stýrd av lærara/undirvísara. Ætlandi eru næmingarnir eisini leiddir og troyttir av skúlagongd, og tí verður neyðugt við námsfrøðiligari nýhugsan, serliga viðvíkjandi tí ástøðiliga partinum. Her verður neyvan nóg mikið við vanabundnari undirvísing.

Av hesum og øðrum orsøkum verður tí ivaleyst neyðugt at hava skeið fyri tey, ið skulu hava hesi nýggju útbúgvingartilboð um hendi, - og tá serliga fyri tey, ið skulu skipa fyri verkætlanum, og sum sostatt skulu slóða fyri hesum fyritakssemi.

## 10.5 Undirvísingarmiðlar

Tað er at vænta, at tað er heldur knípið við tilfari í sjálvum skúlanum til hesa undirvísing. Tí verður neyðugt at hava góða atgongd til ymsar miðlar sum t.d. sjónvarp, uppvørpu, bond, kort, bókasavn, verkstaðir og serstovur. Góðir ljóstaksmøguleikar og telduútgerð vera alneyðug at hava til taks, og tí má peningur verða settur av til tær útreiðslur, ið standast av tílíkum virksemi.

### 10.6 Upplýsing um tiltakið
Tað verður neyðugt, at ráðgeving er tøk til at hjálpa skúlunum við at fáa skipanina í lag og at fylgja við alla tíðina. Henda ráðgeving skal kunna svara spurningum, leiðbeina og stuðla við hugskotum og vísa á møguleikar. Ein annar møguleiki er at skipa ein verkætlanarbólk, sum nevnt er aðrastaðni í álitinum.

## 11. Royndir
Verkætlanin eigur fyrst og fremst at byggja á tann tørv, sum er í føroyska samfelagnum í dag hjá teimum ungu at finna sær støði at byggja eina framtíð á. Harumframt byggir henda útbúgvingarætlanin á líknandi royndir, sum gjørdar eru í dagháskúlum, unglinga- og framleiðsluskúlum í okkara grannalondum. Men eisini her á landi eru ávísar royndir gjørdar við eini øðrvísi skipan og innihaldi í 10. flokki, og tey royndarprojekt, sum her eru til taks, kunnu somuleiðis verða vegleiðandi fyri hesar verkætlanir (sí eisini "Fólkaskúlin - Almennur partur" s. 175-176 um Unglingaskúlan).

Henda skipan skal eftir ætlan verða sett í verk sum eitt royndar- og menningarvirksemi, og tí er eyðsæð, at ráðgevin í royndar- og menningarvirksemi eigur at hava ein virknan lut í sambandi við ráðgeving og leiðbeining í hvørjum einstøkum føri.

Í sambandi við tað ástøðiliga tilboðið verða ráð og leiðbeiningar at fáa frá lærugreinaráðgevunum á Landsmiðstøðini.

Teir næmingar, ið væntandi fara at søkja um upptøku til hesa royndarskipan, eru ungdómar, ið ikki hava ætlanir um framhaldandi lesnað, og sum undir vanligum umstøðum høvdu søkt um lærupláss ella boðið seg fram á arbeiðsmarknaðinum. Hetta er við øðrum orðum næmingar, sum eru í verandi 10. skúlaári og ungdómur, sum fór úr skúlanum fyri ári síðani og meir. Hesir seinnu hava møguliga gjørt einstakar royndir í vinnulívinum.

Ynskiligt er eisini, at ein persónlig ráðgevingartænasta verður skipað.

## 12. Samfelagsumhvørvið
### 12.1 Bygdin/býurin og verkætlanin
Verkætlanarbólkurin setir seg í samband við vinnulívið í økinum og til tey virki, stovnar, bóndagarðar, ferðafólkavinnu o. a., sum vilja verða við í verkætlanini. Eru tað virki, skip ella vinnufyritøkur, sum eru óvirkin, so eigur hesin bólkur at kanna umstøðurnar, so at tey eisini kunnu koma inn í verkætlanina og verða nýtt til eina ella aðra framleiðsluskapandi vinnu.

Um tað vísir seg, at ein verkætlan kann verða framd í verki, og har kunnu fáast eitt ella fleiri arbeiðspláss, so eigur teimum at standa frítt í boði, sum eru farin til verka, at gevast við skúlagongdini, og at tey heldur skulu halda fram sum vinnurekandi í bygdini/býnum við hjálp og vegleiðing frá projektbólkinum.

**Fiskur o.a.**
Aðalráðevni okkara er fiskurin og tað, sum úr havinum kemur. Her eru nógv øki, sum til ber at menna, og sum lítið og einki verður gjørt við sum er. Besta rávøra til súpanarbót endar sum bíligt fiskamjøl, ella kanska verður tað bara tveitt burtur, eitt nú laksa- og sílahøvd, uggar, fjaðrar og ryggir, rækjuskeljar, krabba- og hummaraavnot og ónýttir leskibitar av so at siga øllum fiski.

Til ber at gera skreyt- og gagnslutir burtur úr turkaðari ella garvaðari fiskaskræðu, og tørvur er áhaldandi á nýggjum fiskireiðskapi. Hvat var meira náttúrligt, enn at føroyingar í høvuðsheitum nýttu reiðskap, sum gjørdur er í Føroyum, og at útlendingar sum eina sjálvfylgju keyptu stuttleikafiskireiðskap við sær sum tinganeyst ella kært minni eftir vitjan í Føroyum.

**Ullavirking**
Í flestu bygdum er seyðahald, so ein verkætlan kundi saktans verið ullavirking. Tann ull, sum nú verður blakað burtur, kundi ístaðin verið savnað í eina bingju á rættini, har komandi er at við bili; men fjallmenninir høvdu í øðrum føri óivað verið fegnir at borið ullina heim til húsa, um bert teir vistu, at skúlaungdómurin vildi virkað hana úr lagdi. Á henda hátt kundi skúlin mestsum fingið hesa rávøru ókeypis.

Eitt er gomul og siðabundin ullaviðgerð sum binding og veving og framhaldandi menning av hesum virkisgreinum, og tað er umráðandi at varðveita gamla siðmenning. Men her liggur eisini nýtøki og bíðar, eitt nú tøvingin, sum nógv hava fragd av, men enn ikki sæst aftur í størri samanhangi, og samanseting av ymsum tilfari úr ull, eitt nú tógvi, skinni og roði, og kanska eisini øðrum tilfari, sum hóskar saman.

**Skreytlutavinna**
Stórur partur av hesum, ið frammanfyri er nevnt, kann nýtast í skreytlutavinnu, og á heysti kundi so verkætlanin verið upp tikin við innsavnan av skinnum, hornum, beinum o. ø., sum kundið komið betur til sættis enn nú.

Framleiðslan kundi uttan iva verið seld bæði sum brúkslutir og gávulutir líka frá smáum gávulutum til føroysk klæði.

Tann ástøðiliga læran í sambandi við slíka verkætlan eigur so at vera á serkønum tilevningar ástøði.

**Togvirking**
Føroyar eru sum kunnugt ein fiskivinnutjóð, sum nýtir nógv av togi, ið spunnið verður úr hampi. Ein verkætlan kundi tí verið at virka tog. Hetta kundi verið ein verkætlan, har næmingarnir lærdu at tilvirka togini burtur úr innfluttari rávøru.

Ein sjónvarpssending sýndi fyri stuttum, hvussu ein dani gjørdi skúvoyingum eina nýggja bjargalínu. Slíkt kundi eisini verið gjørt í Føroyum; tað er ikki neyðugt við kostnaðarmiklum maskinum, men neyðugt er sjálvandi at hava serkønar leiðbeinarar (instruktørar) til tílíka framleiðslu.

**Umvælingar og endurnýtsla**
Eitt annað hugskot er at umvæla gomul træskip. Bæði sluppir, deksbátar útróðrarbátar og sonevndir "installeringar" liggja svínabundin ymsastaðni í oyggjunum, og av teimum fara nøkur aldri í vinnu aftur. Hesi før kundu verið umvæld og seld eitt nú áhugaðum útlendingum sum stuttleikaskip og -bátar.
Royndir eiga at verða gjørdar at skilja og nýta eykalutir av burturløgdum amboðum og ymiskum øðrum, sum annars verður tveitt burtur. Eitt nú kundi ein tílíkur bólkur eisini verið við til at skipa fyri, hvussu ruskið í bygdini ella býnum kundi verið skilt.

**Tænastuveitingar**
Ein onnur verkætlan kundi verið at brúkt teir tómu bygningarnar, eitt nú skúlarnar í frítíðini til ymsar tænastuveitingar í sambandi við ferðafólkavinnuna. Her kundi verið matgjørt við øllum burtur úr fiski og aðrari føroyskari rávøru, eins og framsýningar kundu verið, sum sýndu føroyska mentan.

Tann ástøðiliga læran á hesum øki skuldi havt sítt støði í serkønari tænastuveiting og matgerð.

Tá ið tað snýr seg um yrkiskunnandi skeið, er at vænta, at eitt hóskandi samskifti eigur at vera við viðkomandi útbúgvingarstovnar.

Og so aftrat: Lutir burtur úr rekaviði kunnu vera vakrir og siga sína søgu, og har er so mangt, sum kundi verið gjørt, t.d. skerifjalir til breyð og til steikir, og hvussu við træskurði, fjallstavum, trogum, handgjørdum pappíri o.s.fr..

Her eru givnar bert nakrar ábendingar um alt tað, sum liggur á láni, og sum kundi givið ungfólki eina arbeiðs- og skúlaroyndir við hugmyndum um framtíðina, sum siga teimum nakað, men mangt annað kundi sjálvandi verið nevnt

# 13. Góðkenningin

## 13.1. Stovnseting

Fyri at fáa stuðul til stovnseting av útbúgvingartilboðum fyri arbeiðsleysan ungdóm, áliggur tað skúlamyndugleikunum á staðnum at syrgja fyri, at karmarnar fyri hesum tiltakinum eru í lagi.

## 13.2. Umsókn

Umsókn um góðkenning at fara undir útbúgvingartilboð fyri arbeiðsleysan ungdóm skal fata um:

1. Innihaldið í undirvísing/verkætlan
2. Høli
3. Amboð
4. Leiðslu/verkætlanarbólk
5. Undirvísarar
6. Fígging av tiltakinum
7. Tíðarskeið
8. Luttakaratímatal til ávikavist ástøðiliga og verkliga undirvísing

**ad: 1.** Neyðugt er at gera eina ítøkiliga frágreiðing um, hvør ætlanin er, hvat innihaldið í undirvísingini skal vera, og á hvønn hátt hugsanin er at skipa verkætlanina - herímillum tímatal til tær ymsu lærugreinirnar og verkætlanirnar.

**ad: 2.** Til ta ástøðiligu undirvísingina er møguligt at nýta høli í fólkaskúlanum og í einstøkum føri eisini serhøli; men neyðugt er eisini í stóran mun at fáa innivist á veruligum verkstøðum/verksmiðjum o.s.fr.

**ad: 3.** Hetta ætlaða tiltakið krevur eisini nógv fleiri amboð og annan útbúnað, enn vanligi fólkaskúlin er útgjørdur við. Tí er neyðugt, at ætlanin eisini fevnir um, hvussu tílíkur útbúnaður kann fáast til vega.

**ad: 4.** Roknað verður við, at tað verður fólkaskúlaleiðarin í kommununi, ið tekur sær av leiðsluni, men neyðugt verður í ávísan mun at skipa leiðsluna øðrvísi, møguliga við einum verkætlanarbólki. Sagt eigur at verða frá, hvussu hesin spurningur verður loystur.

**ad: 5.** Hildið verður, at fólkaskúlalærarar fara at taka sær av tí ástøðiligu undirvísingini,og at undirvísarar, sum hava útbúgving á viðkomandi øki, koma at taka sær av tí verkligu undirvísingini.

**ad: 6.** Lønin til undirvísingina - bæði ta ástøðiligu og verkligu - eigur at verða goldin úr landskassanum. Leigu av hølum, ljósi, hita, reingerð o.ø. eigur kommunan at gjalda.

**ad: 7.** Her verður hugsað, um talan er um styttri skeið, t. d. 3 - 4 mánaða skeið ella um eitt skúlaár.

**ad: 8.** Ætlanin er, at studningurin verður veittur í mun til næmingatímatalið. Stuðulin verður roknaður í mun til árstímatal næminga.

Tað er neyðugt, at allar hesar upplýsingar eru gjølla sundurgreinaðar.

14. Samanumtikið kann verða sagt, at hesi útbúgvingartilboð hava til endamáls at geva lívi teirra, sum vegna truplar umstøður lítið og einki hava at takast við í løtuni, eitt virðiligt innihald og sostatt byrgja fyri tí versta árininum, ið stendst av tí óvirkissamfelag og tí ráðaloysi, sum fjøldin tykist at stevna fram ímóti. Men henda ætlan kann vónandi eisini í summum førum verða sprotin til lívført sjálvstøðugt virksemi.